

# Markleysir møguleikar

Vit bjóða tveimum ungum fólkum lærupláss á skrivstovu okkara í Saltangará og á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn. Her er møguleikin at fáa eitt starv, har ábyrgd og høvi at arbeiða sjálvstøðugt fylgjast. Her verður tú í lætin neyðugu brynjuna – bæði bókliga og verkliga – til framtíðar arbjóðingar, í Føroyum ella kring um í heiminum.

Talan er um eitt lærupláss, har tú lesur HD, meðan tú vinnur penning. HD er í lætuni hægsta búskaparliga útbúgvingin, ið kann takast í Føroyum, og við HD prógvi eru dyrnar latnar upp fyri viðari útbúgvingum.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. í Danmark, bjóða vittar møguleika fyri farloyvi og møguliga kunnu vit útvega tær arbeiði í lestratíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi í Føroyum, kanst tú gera tað, meðan tú arbeiðir hjá okkum.

Eftir at hava lokið cand. merc. aud. útbúgving, er møguleiki at gerast statsgóðkendur grannskoðari.

Rasmussen & Weihe er limur í heimsins størstu grannskoðarafyritsku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í okkurt um 150 londum. Hetta samstarvið gevur m.a. okkara starvsfólki møguleikar at fáa tær starvsroyndir uttanlands – í prinsippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dámar okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu sannna, at nógv virki leita eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú viljan og evnini til at fullføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini.

Endamálið við grannskoðan er m.a. at gera tað forarbeiðið, ið skal til, fyri at ætekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Eina ætekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi.

Tú fert at læra frá botni um treytir og krøv til, hvussu grannskoðan skal útinnast, og vit stuðla tær sjálvsagt allan vegin í at fullføra málið, tú setur tær. Ráðgeving er ein týðandi partur av grannskoðarayrkinum og fer at verða ein stór arbjóðing til tina bókligu og verkligu vitan um fígging og búskap. Löggáva og ikki minst okkara innanhýsis eftirlit, setta sonnuleiðis stór krøv til yrkisliga stigið á tínum arbeiði. Tað er ein treyt, at tú kennir fulla týdningin av hugtøkum sum ælit, trúvirði, ábyrgd og tagnarskyldu.

Fakliga støðið verður bygt upp gjøgnum bókliga útbúgving og starvsvenjing – sigast má tó, at tað er neyðugt, at tú ert til reiðar at taka eitt stórt tak.
Hósast grannskoðan í sjálvum sær er eitt álvarsmál, leggja vit stóran dent á at hava eitt gott og óhátiðarligt umhvørvi á arbeiðsplássinum.

**Førleikalønir**
Vit rokna við, at tú hevur tikið ella tekur studentur, HF- ella HH prógv í summar, og tú kundi hugsað tær eina hægri búskaparliga útbúgving. Sum ein av teimum bestu í flokkinum, væntu vit, at tú hevur hug at samsetna tað bókliga við ti verkliga, og at tú brennir eftir at sleppa at virka í vinnulívinum. Hósast tínar dygdir, fer útbúgvingin at verða ein stór avbjóðing.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi innan 27. mai 2001. Størvini verða sett eftir summarfrítiðina 2001, men longu í juni mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.
Hevur tú spurningar ella kundi tú hugsað tær at fingið meira at vita um størvini, ert tú velkomin at venda tær til Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen á tlf. 31 10 17

Rasmussen & Weihe er eitt grannskoðara- og ráðgevingarfelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundin grannskoðan, ráðgeva vit á økjum sum rokskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rákstrarætlanum, skattamálum osfr. Í lætuni eru vit 25 starvsfólk í virkinum.
Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn og ein skrivstova er í Saltangará.

Rasmussen & Weihe
Á Glatøsheygdi – Tórshavn



# Bústaðir á breddan

**- Samanbera vit við onnur lond hava vit ongan bústaðarpolitikk í Føroyum. Hvussu vit búgva er viðkomandi fyri okkum øll, ikki bara arkitektar, sigur Rúni Abrahamsen, formaður í Arkitektafelag Føroya, sum tekur stig til at kanna, um bústaðarviðurskiftini í Føroyum eru nøktandi**

BÚSTAÐIR
*Turið Kjølbro*

*- Hoyringin er aktuell beint nú, men tað er altíð viðkomandi hjá einum felag, sum hevur áhuga fyri bústaðarmynstrinum og planlegging, at viðgera hesi viðurskifti, sigur Rúni Abrahamsen, formaður í Arkitektafelag Føroya.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Vit gera einki hol í sjógvin, men vóna, at hoyringin virkar við til, at vit koma eitt fet longur, sigur Rúni Abrahamsen, formaður í Føroya Arkitektafelag. Undir heitinum Betri bústaðir til øll skipar Arkitektafelag Føroya fyri hoyring í Norðurlandahúsinum hósdagin. Endamálið er at lýsa bústaðarviðurskiftini í Føroyum í dag og í framtíðini breitt og viðkomandi. Spurningar, sum verða umrøddir, eru eitt nú: byggja vit teir røttu bústaðirnar, hvønn bústaðartørv hava vit í dag og hvønn tørv kunnu vit vænta í framtíðini, eru møguleikar at byggja øðrvísi, og eru nakrar politiskar verkætlanir.

- Samanbera vit við hvat er í øðrum londum, hava vit ongan bústaðarpolitikk í Føroyum. Vit eftirlýsa nakrar verkætlanir, vit vita at nakrar eru í gongd, men einki hoyrist um tær. Tey eldru arbeiða við sínum, Húsalánsgrunnurin við sínum, Meginfelag Teirra Brekaðu við sínum og so framvegis. Undir hoyringini ber til at hoyra um alt undir einum.

- Vit vóna, at hoyringin setir bústaðin ovast á breddan. Øll, ið eru áhuga í bústaðarviðurskiftum, taka væl undir við tiltakinum og at ljóskastarin verður settur á bústaðarviðurskifti. Og setir hoyringin gongd á eina tilgongd, eru vit ógvuliga væl nøgd, sigur Rúni Abrahamsen.

## Møtimikil tilgongd

Bústaðir eru kjarnuøkið hjá arkitektum, og nú Arkitektafelag Føroya hevur 20 ár á baki í ár, er høvið upplagt at skipa fyri einum tiltaki, sum setir bústaðin og bústaðarviðurskifti á breddan.

- Hvussu vit búgva er viðkomandi fyri okkum øll, ikki bara arkitektar. Tað eru karmar vit øll skulu liva undir, ikki bara í dag, men næstu 100 árini. Tí hevur tað avgjørt okkara áhuga, at hesi tingini verða gjørd á rættan hátt. Arkitektar eru beinleiðis uppi í bygging og samskipan av bygging, og tí snýr tað eisini í stóran mun um okkara yrki, sigur Rúni Abrahamsen.

- Eini sethúsabygging kann ein einstakur persónur taka sær av, meðan íbúðarbygging krevur eina samskipan og at lógarverkið og at politisku karmarnir eru til vildar. Í eini slíkari bygging eru ógvuliga nógv fólk inni í myndini, stovnar og myndugleikar, eins og fígging og ognarviðurskifti eru ein stórur partur. Hetta er sera møtimikið hjá leikfólki at fara undir.

## Hoyringin aktuell

Nógv áhugamál verða umboðað undir hoyringini. Endamálið er at lýsa og allýsa bústaðarviðurskiftini í Føroyum í dag og í framtíðini breitt og viðkomandi. Tey, ið fara at leggja fram, eru Føroya Kommunufelag, Eldrafelag Føroya, Tórshavnar Kommuna, Húsalánsgrunnurin, Føroya Ungdómsráð, Meginfelag Teirra Brekaðu, og Arkitektafelag Føroya. Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður tekur eisini lut undir hoyringini, og Hans Pauli Strøm, sosiologur, fer at greiða frá bústaðar- og familjumynstrinum, og til- og fráflyting.

Herfyri var eitt lógaruppskot til samtyktar um alternativar bústaðarmøguleikar fyri á tingi. Uppskotið fall og tað sást á øllum brøgdum undir viðgerðini, at tingfólk ikki tóku uppskotið í álvara. Hoyringin, Arkitektafelag Føroya nú tekur stig til, er ikki sum ein reaksjón uppá vantandi viljan í tinginum, sigur Rúni Abrahamsen.

Hevði tørvur verið á eini hoyring sum hesi um øll fólk høvdu ein bústað? Ella er tiltakið ein avleiðing av stóra trotinum á bústaðum?

- Hoyringin er aktuell beint nú, men tað er altíð viðkomandi hjá einum felag, sum hevur áhuga fyri bústaðarmynstrinum og planlegging, at viðgera hesi viðurskifti. Vit hava lyndi til bara at hugsa um Havnina, táið ræður um bústaðarviðurskifti, men góður bústaður er fyritreytin fyri trivnaði á útoyggj ella í útjaðaranum.

Hoyringin hósdagin er almenn og ætlað øllum, sum eru áhugað fyri ella hava ávirkan á bústaðarviðurskiftini. Her verður hugsað um vanligar borgarar, lands- og kommunalpolitikkarar, fakfólk og embætisfólk.

Í sambandi við, at Arkitektafelag Føroya hevur 20 ár á baki í ár, verða onnur tiltøk, sum gera vart við bústaðir, eisini fyriskipað.

# Lættari at fara undir alternativa bústaðarbygging

**Í heyst leggur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fyri tingið lógaruppskot, sum ger tað nógv lættari at fara undir alternativa bústaðarbygging í Føroyum.**
**- Uttan mun til, um tað er eins lands- ella ein kommunal uppgáva, skal Húsalánsgrunnurin kunna brúkast sum fíggingarstovnur, sigur Sámal Petur í Grund**

BÚSTAÐIR
*Turið Kjølbro*

Tað er ein rættiliga møtimikil uppgáva at fara undir bygging av alternativum bústaðum í Føroyum sum er. Lógarverkið og politisku karmarnir eru ikki til vildar, men hetta verður øðrvísi um ikki so langa tíð. Í Almanna- og heilsumálastýrinum hava tey í drúgva tíð arbeitt við at gera nýtt lógaruppskot um Húsalánsgrunnin. Endamálið er at broyta viðtøkurnar soleiðis, at tað verður einfaldari og lættari at fíggja alternativa bústaðarbygging í Føroyum. Leisturin til uppskotið er liðugur, men enn vantar at avgreiða nakrar prinsipiellar spurningar, og tað eru hesir, ið eru orsøkin til, at tað hevur tikið so langa tíð at gera uppskotið. Nú verður lógaruppskotið raðfest so mikið høgt í Almanna- og heilsumálastýrinum, at stýrið hevur gjørt av at brúka hjálp uttanifrá at gera tað liðugt.

Ein spurningur, ið eftir er at greiða, er, hvør uppgávan hjá Húsalánsgrunninum skal vera í framtíðini. Skal hann fyrst og fremst taka sær av sethúsabygging sum higartil, ella skal hann sleppa hesi uppgávuni og fara inn á alternativa bygging burturav.

- Ætlanin er at leggja Húsalánsgrunnin, Íbúðargrunnin, og Bjálvingarstuðulsgrunnin saman við eini umsiting og grundfæið, sum er í øllum, verður grundstøðið hjá hesum. Og kommunal uppgáva, skal Húsalánsgrunnurin kunna brúkast sum fíggingarstovnur, sigur Sámal Petur í Grund.

*- Tað hevur ongantíð verið størri áneyðir enn júst nú á einum bústaðarpolitikki fyri allar Føroyar, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*

## Bústaðarpolitikkur

Tað verður í fyrsta lagi í komandi tingsetu, at nýggja lógaruppskotið verður lagt fyri tingið. Í kjalarvørrinum á uppskotinum er væntandi, at eitt kjak um bústaðarpolitikk kemur.

- Tað hevur ongantíð verið størri áneyðir enn júst nú á einum bústaðarpolitikki fyri allar Føroyar, sigur Sámal Petur í Grund. Í Almanna- og heilsumálastýrinum fara tey at seta hol á at orða ein bústaðarpolitikk sum skjótast, men landsstýrismaðurin torir ikki at siga nakað nærri um, nær vit hava ein bústaðarpolitikk fyri Føroyar.

Stórt trot er á bústaðum, ikki bara í miðstaðarøkinum, men eisini úti um landið. Áhugafelagskapir vísa á stóran tørv á íbúðum til fólk, ið hava serligan tørv, annaðhvørt tað eru til rørslutarnað, menningartarnað, sálarliga sjúk, eldri fólk og so framvegis. Vit tosa um ein rættiliga stóran tørv og soleiðis sum ferðin er í løtuni, tekur nógv ár at nøkta hann.

- Tørvurin er bygdur upp í nógv ár og tað tekur meiri enn 2-3 ár at nøkta hann. Eitt nú tørvar teim sálarsjúku 77 íbúðir og tá tosa vit um tíðarkarm á 10 ár at nøkta tørvin, sigur Sámal Petur í Grund. Hósdagin tekur landsstýrismaðurin lut undir hoyringini, sum Arkitektafelag Føroya skipar fyri um bústaðarviðurskiftini í Føroyum.